# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg vil gjarna gera púrasta greitt, at tað er eingin í B36 ella FC Tórshavn, sum hevur kontakað spælaran uttan um B71*

*Per Hansen, formaður í B36*

# Vit tosaðu við B71 fyrst

**Formaðurin í B36, Per Hansen, sigur, at hann persónliga tosaði við formannin í B71, áðrenn felagið tosaði við Magnus Olsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Eingin í B36 ella FC Tórshavn hevur tosað við Magnus Olsen, uttan at B71 visti av hesum, slær B36-formaðurin fast*

- Vit hava hildið okkum til reglurnar. Eg tosaði sjálvur við formannin hjá B71, áðrenn nøkur ítøkilig stig vórðu tikin. Somikið stutt er tann støðan.

Somikið avgjørdur er formaðurin í B36 um ákæruna, sum B71 hevur reist móti B36, sum teir siga hevur dyrgt eftir Magnusi Olsen, uttan at B71 hevur verið partur av málinum. Nakað sum er ólógligt, tá spælarin hevur sáttmála við B71.

- Í fyrsta umfar játtaði B71-formaðurin eisini, at vit kundu tosa við spælaran. Men at hann seinni kúvendir í hesum, er so ein annar partur av søguni. Men eg vil gjarna gera púrasta greitt, at tað er eingin í B36 ella FC Tórshavn (felagið, ið rekur Formula-hópin, blðm.), sum hevur kontakað spælaran uttan um B71.

- Vit hava havt onkur dømi um, at misskiljingar eru komnar fyri í slíkum málum. Tað vilja vit sjálvandi sleppa undan, og júst tí ringdi eg fyrst av øllum til formannin hjá B71. Vit hava so onga orsøk til ikki at halda reglurnar í slíkum málum, og tað havi eg greitt bæði formanninum og øðrum ábyrgdarpersónum í B71 frá, sigur Per Hansen.

# Arsenal til Old Trafford

**Chelsea og Liverpool fingu dystir á heimavølli, meðan Manchester United og Arsenal bresta saman á Old Trafford**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Huddersfield frá triðbestu ensku deildini, League One skulu á eina heldur torføra uppgávu á Stamford Bridge, har teir møta Chelsea, men størsti dysturin í fimta umfari skerst ikki burtur. Tað er sjálvandi dysturin millum nummar eitt og tvey í Premier League.

Huddersfield hava drigið vinnararnar frá í fjør, Chelsea á Stamford Bridge, men tað er eittans dystur, ið skínur framum allar aðrar í fimta umfari, og tað er á Old Trafford leikvøllinum, har Manchester United taka móti Arsenal.

### Lægst í metum

Huddersfield er saman við Bristol Rovers, lægst á styrkislistanum, av teimum liðum, ið eru eftir í fimta umfari. Teir eru ovurhondsfegnir um at sleppa at møta Chelsea, tí hetta gevur ein ávísan prosentpart av áskoðarainntøkunum. Og dysturin verður sum kunnugt spældur í London á glæsuliga Stamford Bridge leikvøllinum, har ein øðilig rúgva av fólki sleppur inn til dystin, so tað fer at verða ein kærkomin peningainnspræning, ið Huddersfield fær.

### Rovers trúgva uppá sín møguleika

Í Bristol Rovers hava teir hinvegin trúnna uppá, kanska at náa fjórðingsfinalurnar, eftir at teir drógu Southampton. Hesin dysturin kann gerast sera javnur, og tað er ilt at taka dagar millum hesi bæði liðini. Serliga í FA Cup er ikki altíð, at favorittarnar vinna. Tað eru hvørt einasta ár fleiri dømir um "Giant killings" t.e. tá eitt lægri styrkismett lið vinnur seg langt fram í kappingini og vinnur móti einum liði, ið liggur væl hægri á styrkislistanum.

### Bert seks eru eftir

Nú Arsenal skal spæla móti United, er tað heilt víst at minst eitt Premier League lið rýkur út í fimta umfari.

Liverpool vóru hepnir í teirra lutakasti, tí eftir at hava skúgvað Havant & Waterlooville til viks, fingu teir enn ein dyst á heimavølli, hesaferð móti Barnsley úr The Championship.

Tey írestandi Premier League liðini, Middlesbrough og Portsmouth, skulu bæði á truplar uppgávur, tá tey bæði skulu møta liðum úr The Championship, á útivølli. Tey skulu møta ávíkavist Sheffield United og Preston.

### Tvey Championship lið tryggjað

Í minsta lagi tvey lið úr The Championship eru tryggjað luttøku í fjórðingsfinalunum. Hetta varð greitt, tá Cardiff dróg Wolves, meðan arvafiggindarnar úr The Midlands, Coventry og West Bromwich fara at dystast á The Ricoh Arena í Coventry.

## FAKTA

**Lutakastið:**

Bristol Rovers v Southampton
Cardiff v Wolves
Sheff Utd v Middlesbrough
Liverpool v Barnsley
Manchester United v Arsenal
Preston v Portsmouth
Coventry v West Brom
Chelsea v Huddersfield

*Dystirni verða spældir 16. og 17. februar*